# Summarframsýningin 2005 í Listaskálanum

**Summarframsýningin 2005 letur upp mentanarnáttina 3. juni kl. 21.00 til kl.23.00 í Listaskálanum.**

**Í ár luttaka listafólkini:**
**Amariel Norðoy, Asgerð (Aggi) Ásgeirsdóttir, Guðrið Poulsen, Hans Pauli Olsen, Jóna Rasmussen, Kári Svensson, Marius Olsen, Rannvá Mortensen, Súsanna í Jákupstovu, Vígdis Petersen og Zacharias Heinesen.**

**Í sambandi við upplatingina av framsýningini framføra tveir av dugnaligastu næmingunum á Tórshavnar Musikskúla Mattias Kapnas, klaver og hann spælir Præludium og fuga i d-mol af J.S.Bach, Mattias vann 2. virðisløn í Berlingske Tidendes Klassiske Musikkonkurrence og Jón Festirstein, violin spælir Gavotte af J.S.Bach, Jón byrjar á Det Kgl. Danske Musikkonservatorium.**

Opið er:
Týsdag til fríggjadag kl. 14.00 til 17.00
Leygardag og sunnudag kl. 14.00 til 18.00

**Listasavn Føroya**
TEL 313579 · WWW.ART.FO

Sosialurin 341800

# Skrivstovufólk/málsviðgeri

**(fyri skrivstovufólk í farloyvi)**

**Starvið**
Av tí at eitt av starvsfólkum okkara fer í farloyvið, er eitt áhugavert starv sum skrivstovufólk/-málsviðgeri leyst at søkja á Stuðulsstovninum frá 1. august 2005 til 30. juni 2006.

**Høvuðsuppgávurnar verða m.a.:**
- Málsviðgerð í ÚSUN-skipanini*
- Umsiting av lestarlánum
- Vanligar skrivstovuuppgávur

**Førleikakrøv**
Vit vænta okkum m.a., at umsøkjarar hava
- Skrivstovuútbúgving, HH/student ella líknandi
- Góðan kunnleika til enskt í skrift og talu*
- Góðan kunnleika í nýtslu av edv.
- Góðan kunnleika til føroyskt
- Fyrikomandi og góð samstarvsevni
- Førleika til at arbeiða sjálvstøðugt

**Vit bjóða**
- Eitt ábyrgdarfult, áhugavert og fjølbroytt starv í einum stovni í menning
- Sjálvstøðugt starv við møguleikum fyri bæði persónligari og fakligari menning

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Viðmerkjast skal, at setanarøkið fevnir um alt aðalráðið og deildir/stovnar tess.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum o.ø skulu sendast til:

Stuðulsstovnurin

Stílað: Terja á Lakjuni
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
FO - 110 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi seinasta lagi 20. juni 2005.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Terja á Lakjuni, leiðara á Stuðulstovninum, á telefon 35 68 00 ella 44 47 39.

* Í ÚSUN-skipanini verður útbúgvingarstuðul veittur til tey, ið lesa uttanfyri Norðurlond. Tað er í hesum sambandi at kunnleiki til enskt er ein fyrimunur.

*Stuðulsstovnurin er ein stovnur undir **Mentamálaráðnum**, ið hevur til uppgávu at veita fíggjarligan stuðul til lesandi føroyingar. Á **Stuðulsstovninum** starvast 5 fólk. Stovnurin rindar mánaðarligan lestrarstuðul til umleið 2.000 lesandi í Føroyum og árligan ferðastuðul til umleið 1.100 lesandi uttanlands, umframt at veita lestrarstuðul til lesandi uttanfyri Norðurlond (ÚSUN). Harumframt krevur stovnurin inn lestrarlán frá umleið 2.700 persónum. Stuðulsstovurin hevði í 2004 eina útreiðslujáttan uppá 2,4 mió. kr., og veitt uml. 76 mió. kr. í lestrarstuðli.*

# Ein pedagogur og tveir avloysarar

## til dagstovnin í Fuglafirði

Dagstovnurin er ætlaður 60 børnum, og er stovnurin skipaður í tvey hús við eini barnagarðstovu og eini vøggustovu í hvørjum húsi.

Til stovuna í Króki verður søkt eftir einum pedagogi 40 t. viku, at byrja 15. september 2005.
Starvið er á stovu við 12 børnum í aldrinum 0-3 ár.

Til stovuna í Króki verður søkt eftir einum avloysara fyri hjálparfólk 40 tímar um vikuna. Starvið er tíðaravmarkað frá 01. august 2005 til 30. juni 2006.

Til stovuna undir Hamri verður søkt eftir 1 pedagogi 40 tímar um vikuna.
Starvið er tíðaravmarkað frá 01.august 2005 til 30. juni 2006.

Møguligar setanarsamrøður verða í viku 25.

Lønin verður sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.
Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Juliannu Næs, leiðara tlf. 225222 / 444940.

Umsóknir saman við avritum av prógvum og viðmælum skulu verða býráðskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 20. juni 2005 kl. 10.00.

Býráðið skilir sær rætt til at velja millum innkomnu umsóknirnar ella onga at taka.

Fuglafjørður, tann 02. juni 2005
**Fuglafjarðar býráð**

## Tvingsilssøla

**Fríggjadagin 1. juli 2005, kl. 13.30** verður á dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir ognina **matr. nr. 31a, Skúvoy.** (AS nr. 2-21/2005)

Sambært tingbóksattestini er talan um

part av matr. nr. 31 a, Skúvoy - uttangarðs - ið er ávikavist:

1 mørk 2 gyllin 16 2/3 skinn og 3 gyllin og 13 1/3 skinn

Tvingsilssølan er umbiðin av **Jógvani P. Lassen, adv., Yviri við Strond 4, Boks 359, 110 Tórshavn, tlf. 311260, (sak. nr. 1930302)**, sum kann geva nærri upplýsingar um ognina og sum nærri avtala kann gerast við, um ynski er at síggja ognina.

Tvingsilssøluuppgerð kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á Dómaraskrivstovuni.

Føroya fútarættur,
tann *27. mai 2005*

veitst tú ikki tað? Sosialurin

Sniðgev tín egna skógv



mi adidas

7. - 11. juni bílegg tíð

P/F THOMAS DAM
ÍTRÓTTUR · N. Finsensgøta 5
Postsmoga 268 · 110 Tórshavn · Tel 35 53 00

felagið
**Tórshøll**
um vikuskiftið spæla:
# JULIANNU BOYS
**SJAVSKAPPING**
verður týsdagin 7. juni kl. 19.00
**ÓKEYPIS ATGONGD**
fríggjakvøldið og sunnukvøldið

Sosialurin 341800

**LEIGA AMBOÐ & MASKINUR**

Kaj Andreasen & Co
BREKKUTÚN 7 · 188 HOYVÍK
TEL 31 56 00

## GSM telefonir &

**GSM & VHF telefonir v.m til skip og bátar**

**Storno**
SØLA & TÆNASTA
Handan Á 6 · Tórshavn
Tel 31 44 14 · Fax 31 80 45
storno@post.olivant.fo